2011-1576/12
SG

INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

Tórshavnar Kommuna
Vaglið Postrúm 32
110 Tórshavn

Móttikið
10 APR 2012
Journal

3. apríl 2012
Mál: 12/00109-5
Tygara skriv: 2011-1576/9
SG
Málsviðgerð: KHP

**Viðvíkjandi serstakari byggisamtykt fyri Kaldbaksbotn**

Eftir reglunum í løgtingslóg nr. 13. frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 81 frá 25. mai 2009, hevur Tórshavnar kommuna sent Innlendismálaráðnum uppskot til serstaka byggisamtyktini fyri Kaldbaksbotn til góðkenningar.

Kommunan biður í skrivi, dagfest 21. februar 2012, um góðkenning til at gera eina serstaka byggisamtykt fyri Kaldbaksbotn, har eitt A1-sethúsaøki á uml. 700 m2 verður lagt rundanum sethúsini á matr. nr. 101a í Kaldbaksbotni.

Broytingin hevur sambært Tórshavnar kommunu ligið frammi frá 2. til og við 23. januar 2012. Tá mótmælisfreistin var úti tann 13. februar 2012, var einki mótmæli innkomið.

Innlendismálaráðið hevur havt málið til ummælis hjá Býarskipanarnevndini, sum hevur latið Innlendismálaráðnum álit í málinum, sí hjálagda avrit, dagfest 3. apríl 2012.

Vísandi til omanfyri standandi verður sagt frá, at Innlendismálaráðið við heimild í § 4 í býarskipanarlógini góðkennir serstøku byggisamtyktini fyri Kaldbaksbotn

Hjálagt rættað kortskjal fyri serstøku byggisamtyktina fyri Kaldbaksbotn, við átekning frá Innlendismálaráðnum.

Vegna Innlendismálaráðið

K Poulsen
Kristvør Poulsen
skrivstovufulltrúi



Kaldbaksbotnur
Kráartangi
A1
INNLENDISMÁLARÁÐIÐ
Mál nr.: 12/00109
Góðkent: 3/4-2012
Dagfesting: 3/4-2012
Váttað:
A1 sethúsarøki
Tórshavnar Kommuna
Byggi- og býarskipanardeildin
Heiti: Serstøk bygglsamtykt fyri Kaldbaksbotn.
Viðmerking: Uppskot
Skjal nummar: 1.
Journal nr: 2011-1576
Dagur: 15.11.2011
Mát:
Tekna: MKJ
Rættað: